# Umhvørvisflokking av virkjum í Tórshavnar kommunu – vegleiðing

Umhvørvisflokking av virkjum er ein meting av, hvussu stór fjarstøða er neyðug millum virkir og bústaðir, soleiðis at bústaðarøki ikki hevur ampa av virkjum og virksemi teirra. Umhvørvisflokkingin og tilhoyrandi frástøðan byggir á royndir innan umhvørvisárin frá tí einstaka virkisslagnum. Frástøðan í vegleiðingini tekur somuleiðis hædd fyri, at virkir møguliga verða áløgd herd umhvørviskrøv framyvir.

Vegleiðingin er galdandi fyri staðseting í samband við stovnan av nýggjum virkjum. Flokkingin er býtt upp í 7 flokkar, alt eftir hvussu dálkandi virkið verður mett at vera. Flokkur 1 eru virkir við lægst umhvørvisligum ampum og flokkur 7 eru virkir, ið hava stóra ávirkan á umhvørvið.

Frástøðurnar fyri hvønn umhvørvisflokk eru ikki fráleikakrøv, ið skulu lúkast, men heldur skal hetta brúkast sum ein leiðbeining um frástøðu millum virkir og bústaðir.

Vegleiðingin greiðir frá, hvørjir virkir (slag) hoyra til hvønn umhvørvisflokk og eitt yvirlit er somuleiðis givið í Talvu 1. Virkir innan sama virkisslag kunnu vera í fleiri umhvørvisflokkum. Hetta kemst av, at tað kann verða stórt fjølbroytni innan hvørt slag av virki og teirra umhvørvisátøkum. Um eitt virki setur tiltøk í verk fyri at minka um dálking ella annan ampa, sum t.d. nýtslu av grønari orku ella aðrari umhvørvisvinarligari tøkni, kann virkið í hesum føri flokkast lægri og harvið eisini hava eina lægri frástøða til bústaðir.

Frástøðan, ið er nevnd undir ymisku flokkunum er serliga ætlað til frástøðu til bústaðir. Eisini kann frástøða verða í mun til annað virksemi í einum øki, har blandað vinnulív er staðsett. Um frástøðan verður mett í mun til aðrar vinnur og vinnubygningar, ið eru viðkvæmar fyri ljóði, høgum títtleika av tungari ferðslu v.m., bindur hetta ikki vinnustykkini í økinum til at broyta tær ásetingar, ið eru fyri hesi vinnustykkir.

Atlit skulu altíð vera tikin fyri viðkvæmum recipientum í samband við staðseting av virkjum og frástøðu til hesar. Dømi um viðkvæmar recipientar eru vøggustovur og barnagarðar, skúlar, sjúkrahús, eldrabústaðir, frílendisøkir, grøn økir v.m.

### Talva 1: Umhvørvisflokkar 1 til 7 við tilhoyrandi frástøðu og slag av virki/virksemi

| | Minsta frástøða (m) | Slag av virki/virksemi |
|---|---|---|
| Flokkur 1 | 0 | Handlar, skrivstovur og annað líknandi virksemi |
| Flokkur 2 | 20 | Bókbindarar, elektronikk verkstaðir, royndarstovur |
| Flokkur 3 | 50 | Handverkara virkir og onnur minni tænastu virkir |
| Flokkur 4 | 100 | Matvøruframleiðsla, bilverkstaðir við og uttan sproytukabinu |
| Flokkur 5 | 150 | Maskinverkstaðir, betongvirkir, sláturvirkir |
| Flokkur 6 | 300 | Størri maskinvirkir, betongvirkir, sláturvirkir, asfaltvirkir |
| Flokkur 7 | 500 | Orkuverk, brennistøð, heilvágs- og pesticidframleiðsla |

**Flokkur 1**
Umfatar virkir, ið ikki elva til nakra ávísiliga dálking ella nevniligan ampa fyri sítt umhvørvi og kunnu tí staðsetast í bústaðarøkjum. Virkir í hesum flokkinum eru serliga handlar, lítil verkstøð við handli og annað minni virksemi, eitt nú fyrisiting, skrivstovur, læknar, tannlæknar, matstovur og aðrar tænastuvinnur. Eingin frástøða til bústaðir er fyri henda flokk, og kunnu hesi virkir tí eisini staðsetast í einum býlingi.

REV 23.09.2024

**Flokkur 2**
Umfatar virkir, ið geva orsøk til smávegis ávirkan á sítt nærmasta umhvørvi og kann staðsetast í øki, har tað eisini eru bústaðir. Virkir í hesum flokkinum eru serliga minni virkir sum bókbindarar, elektronikk verkstaðir og starvstovur. Minsta frástøða til bústaðir fyri henda flokk er 20 metur.

**Flokkur 3**
Umfatar virkir, ið geva orsøk til minni ávirkan á sítt umhvørvi, serliga orsakað av uttandura aktiviteti og kunnu staðsetast í ídnaðarøki ella í randarøki, sum minni dálkandi virkir. Virkir í hesum flokkinum eru serliga virkir sum hava tænastuvirksemi, tvs. handverkstaðir, maskinvirkir og bensinstøðir. Minsta frástøðan til bústaðir fyri henda flokk er 50 metrar.

**Flokkur 4**
Umfatar virkir, ið geva ávirkan á sítt nærmasta umhvørvi, men eru tey lættastu av teimum tungu framleiðsluvirkjunum. Kunnu staðsetast í einum ídnaðarøki. Virkir í hesum flokkinum eru serliga matvøruvirkir, klædnavirkir og bilverkstaðir við sproytukabinu. Minsta frástøða til bústaðir fyri henda flokk er 100 metrar.

**Flokkur 5**
Umfatar virkir, ið hava størri ávirkan á sítt nærmasta umhvørvi. Kunnu staðsetast í einum ídnaðarøki. Virkir í hesum flokkinum eru serliga maskinvirkir, betongvirkir, snikkaravirkir og virkir, sum framleiða kemisk evnir, eitt nú málingavørur. Minsta frástøða til bústaðir fyri henda flokk er 150 metrar.

**Flokkur 6**
Umfatar virkir, ið hava størri ávirkan á sítt nærmasta umhvørvi. Kunnu staðsetast í størri ídnaðarøki, har fráleiki til grannar kann haldast. Eisini kann staðsetingin verða í vinnuøkjum, har bert virkir við serligum fráleikatørvi liggja. Virkir í hesum flokkinum eru størri maskin- og betongvirkir, sláturvirkir og asfaltvirkir. Minsta frástøða til bústaðir fyri henda flokk er 300 metrar.

**Flokkur 7**
Umfatar virkir, ið kunnu hava stóra ávirkan á umhvørvi, og sum eiga at verða staðsett í størri ídnaðarøkjum, har fráleiki til grannar kann lúkast. Eisini kann staðsetingin verða í vinnuøkjum, har bert virkir við serligum fráleikatørvi liggja. Virkir í hesum flokkinum eru orkuverk, hitamiðstøð, brennistøð, asfaltvirkir, framleiðsluvirkir til heilivág og pesticidir og onnur størri framleiðsla, landbúnaður, skipasmiðir, flogvallir, skjótibanar, koyribreytir osfr. Minsta frástøða til bústaðir fyri henda flokk er 500 metrar.

Flokkur 7 eru virkir, ið geva orsøk til umfatandi ávirkan á umhvørvið og hava tí ofta serlig krøv til staðseting. Ofta eru virkir í hesum flokki ikki tikin við verandi ætlan fyri eitt øki, og verða tí staðsett út frá tí einstaka virkseminum og endamálinum. Hesi virkir hava ofta eina meira nágreiniliga frágreiðing, eitt nú umhvørvisárinsmeting (VVM-kanning), um árin á umhvørvi og grannar.

Staðseting eigur at vera í økjum, ið eru til virkir og endamál, sum halda neyðugu frástøðuna til grannar. Staðseting kann í ávísum førum verða í 4. grundumráði, um ein umhvørvisárinsmeting av virkinum og virkseminum fyriliggur.

Kelda: Håndbog om Miljø og Planlægning – boliger og erhverv i byerne, Miljøstyrelsen, Skov- og Naturstyrelsen, Danmark, 2004.

*Samtykt av býráðnum 11. desember 2014.*